# Vegleiðing um sterilisatión

## Fyrireiking

Kanningin fer fram undir fullari doyving. Áðrenn tú møtir, verður tú biðin um at fara í bað og vaska nalvan serliga væl; nýt um neyðugt vattpinn.

Kynshárini oman fyri skambeinið skulu varliga takast burtur við saksi ella elektriskari rakimaskinu.




Figur 1. Filshies clips sat på æggelederne et par cm fra uterinhjørnerne.

## Skurðviðgerðin

Kanningin tekur umleið hálvan tíma. Læknin førir kikaran inn í búkholuna gjøgnum eitt lítið op við nalvan; eisini verður eitt lítið op gjørt oman fyri skambeinið.

Undir skurðviðgerðini verður luft førd inn í búkholuna fyri at fáa yvirlit. Sterilisatiónin verður framd við at eggrótirnar verða brendar ella pentaðar saman.

Eftir skurðviðgerðina verður luftin tømd út aftur, og sárini seymaði við upploysiligum tráði.

## Eftir skurðviðgerðina

Áðrenn tú verður útskrivað, kemur læknin at tosa við teg. Best er at binda frið í 2-7 dagar. Vanliga hevur tú eitt vatnavvísandi plástur á skurðinum, og kanst tú tí fáa tær brúsubað dagin eftir skurðviðgerðina. Plástrið kann takast av aftaná 2-3 dagar.
Innan fyri ta fyrstu vikuna kann tað í einstøkum førum fyrikoma bruni.

## Far til lækna

- um tú fært nógva pínu í búkin
- um tú fært  meira enn 38° fepur

Um aðrir trupulleikar vísa seg innan 24 tímar eftir skurðviðgerðina, so skalt tú seta teg í samband við bráðmóttøkuna/skaðastovuna.

## Pína eftir skurðviðgerðina

Eftir skurðviðgerðina er vanligt at hava lætta sárpínu og at kenna pínu upp í akslarnar og herðabløðini orsakað av tí luft, sum verður blást inn í búkholuna.
Pínan minkar líðandi eftir nøkrum døgum.

Pínustillandi heilivágur, sum t.d. Panodil og líknandi, kann takast eftir tørvi.
Sjá vegleiðing um mongd á eskjuni.

Vinarlig starvsfólkini á
Skurðdeplinum

Landssjúkrahúsið
tel 304500, www.ls.fo